# Kappsigling á Skálafjørðinum

**Árliga kappsiglingin við 4- og 5-mannaførum, ið Lions Club Eysturoy skipar fyri, verður á Skálafirði sunnudagin hin 17. august**

KAPPSIGLING
*Tíðindaksriv*

Síðani 1970 hevur Lions skipað fyri hesi kapping, og hava tilsamans meira enn 150 ymiskir bátar luttikið í kappsiglingini í hesum tíðarskeiði. Fyrsta árið luttóku 20 bátar, men sum árini hava gingið hevur luttøkan vaksi javnt. Seinastu tíðina hevur luttøkan ligið millum 30 og 40 bátar. Tað er fyri tað mesta bátar av Skálafjørðinum og frá eystursíðuni á Streymoynni, sum plaga at kappast, tó eru einkultir bátar frá øðrum bygdum eisini.

Vinnandi báturin fær ferðasteyp og verður eisini steyp latið til 3 teir fyrstu bátarnar. Seinasta ár var tað Hoyvíksbáturin við Egil Simonsen, Tórshavn, sum vann siglingina, meðan Malli við Oddmar Joensen, Kollafjørður, gjørdist nr 2 og Vinur við Óla Mikkelsen, Tórshavn, bleiv nr 3.

Málið verður sum vanligt við høvuðspierin í Runavík. Alt eftir hvussu veðrið er, verður avgjørt sunnumorgunin, um siglt verður inn- ella úteftir fjørðinum.

Eins og undanfarin ár verður ein drekkamuður serveraður fyri luttakarunum í matarsalinum hjá Føroya Fiskavirking í Runavík.

Ì samband við kappsiglingina verður ein lutaseðil seldur og verður ágóðin av tiltakinum latin til vælgerandi endamál endamál í Eysturoy.

# Dani vann FM

**Beint undan ólavsøku varð spælt um FM í tennis, men tá vinnari ikki kann roknast sum føroyingur, verður føroyameistarin ikki kosin fyrr enn eftir komandi kapping**

TENNIS
*Tíðindaskriv*

Í døgunum 23. til 27 juli varð FM í tennis, sum Havnar Tennisfelag stendur fyri, spælt á tennisvøllinum í Gundadalið í Tórshavn. Vinnarir vóru funnir hjá dreingum U-14 og U-18, hjá monnunum, B-bólkinum hjá monnum, og hjá kvinnum.

Finalan hjá monnum varð vunnin av dananum Scot Christensen á Martin N. Simonsen 6-1 6-0. Í B-bólkinum vann Martin Heinesen á Bárður Háberg 7-6 6-2.

Kappingina fyri kvinnur vann Sára Arge við einum 7-5, 7-5 sigri á Fridu Poulsen, og Hjalti M. Jacobsen og Magnus í Króki vunnu kappingarnar hjá ávíkavist U-18 og U-14. Her vóru mótstøðuleikararnir í finaluni ávíkavist Pól Andreasen og Niclas Eysturoy.

Annars kann Scot Christensen ikki verða almennur føroyameistari í tennis. ÍSF-reglurnar siga, at spælari sum ikki hevur búð fast í Føroyum í minsta lagið 2 samanhangandi ár, ikki kann gerast almennur vinnari av FM, um ikki einstøku feløgini sjálv hava gjørt serliga reglur galdandi fyri útlendingar. Tennisfelagið hevur ikki sjálvt slíkar reglur, og hava tí avgjørt at finna alemenna føroyameistaran í næsta kappingini hjá felagnum, Niels L. Arge Open.

Tekning til næstu kappingarnar hjá monnum, kvinnum, U14 og U18 verður inntil hósdagin 14. august, tá kappingin hjá monnum byrjar. Vinnarin av kappingini hjá monnum fær eisini eina peningavirðisløn handaða frá Niels L. Arge.

## Svimjing um Nólsoyarfjørð

Sum partur av ovastevnuni í Nólsoy var aftur í ár svomið um Nólsoyarfjørð. Hetta hendi leygardagin, tá svimjararnir løgdu frá landi yvir við Strond.

Vinnarin av kappingini var aftur í ár Dia Jacobsen, sum eisini eigur metið á teininum. Hesa ferð var tað fyri tað mesta Evald Rasmussen, sum royndi at trýst hann, men við góðum fimm minuttum aftur til Evald var tað kortini ein tryggur sigur hjá Dia.

Vert er annars at leggja til merkis, at Tórur A. Hansen hesa ferð gjørdist yngsti svimjarin, sum hevur svomið teinin. Tórur varð nummar seks av teimum sjey svimjarunum, sum komu vegin fram, og uttan stórvegis trupulleikar megnaði hann at halda kósina beint inn til bygdina, har hann kom á land tætt inni undir kirkjuni.

**-jm**

# Ólavsøkurenningin 2003

Sum vant, so skipaði Bragdið fyri ólavsøkurenning, tá føroyingar hildu tjóðarhátíð sína. Umframt fimm kilometur langa teinin, sum tey vaksnu runnu, so sluppu yngru rennararnir eisini at royna seg á styttri teinum.

Hjá monnunum var tað ikki óvæntað Bogi Lenvig, sum var skjótastur á teininum. Hann var nærum ein minutt undan Símun Joensen, sum á øðrum megnaði at halda Johnard Larsen aftan fyri seg.

Hjá kvinnunum var somuleiðis talan um ein suverenan vinnara. Borgarhjørt Holm, sum á Oyggjaleikunum var partur av Marathon-liðnum hjá føroyingum, kom á málið nærum tveir minuttir undan næsta rennaranum, sum var Tordis D. Eiriksfoss.

Tey trý fremstu í hvørjum bólki komu annars á mál í hesi raðfylgju:




**5 km menn**

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Bogi Lenvig | 15,53 |
| 2 | Símun Joensen | 16,48 |
| 3 | Jonhard Larsen | 16,56 |

**5 km menn, veteranar**

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Óli Olsen | 19,57 |
| 2 | Henning Clemens Poulsen | 19,58 |
| 3 | Ólavur Herup Olsen | 20,32 |

**5 km kvinnur**

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Borgarhjørt Holm | 19,35 |
| 2 | Tordis Debes Eiriksfoss | 21,32 |
| 3 | Jóngerð Høgnesen | 24,38 |

**5 km kvinnur, veteranar**

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Jóngerð Høgnesen | 24,38 |

**600 m, dreingir 7**

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Teis Horn | 2,17 |
| 2 | Betuel Hansen | 2,25 |
| 3 | Bartal Wardum | 2,31 |

**600 m, dreingir 10**

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Rúni Seloy | 1,56 |
| 2 | Jóhan á Plógv Hansen | 2,00 |
| 3 | Oyvind Lützen | 2,02 |

**1200 m, dreingir 12**

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Robin Jønsson | 3,41 |
| 2 | Daniel Djurhuus Rein | 3,44 |
| 3 | Remi Langgaard | 3,52 |

**1200 m, dreingir 17**

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Jóan Karl Joensen | 3,30 |
| 2 | Álvur F. Christiansen | 3,39 |
| 3 | Bárður Johannesen | 4,00 |

**600 m, gentur 7**

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Elin D. Hansen | 2,26 |
| 2 | Hildur Egilsdóttir | 2,36 |
| 3 | Bjørk Reynagarð Svabo | 2,37 |

**600 m, gentur 10**

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Vár Gregersen | 2,04 |
| 2 | Rebekka Fuglø | 2,13 |
| 3 | Guðrun Hentze | 2,16 |

**1200 m, gentur 13**

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Bjørk Herup Olsen | 4,14 |
| 2 | Jenny Svabo | 4,15 |
| 3 | Maria Holm Lund | 4,36 |

**1200 m, gentur 17**

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Marin í Dali | 4,01 |
| 2 | Annika Vang | 5,06 |
| 3 | Meena Martinsdóttir | 6,12 |




FAROE LAW

bjóðar heimligar og altjóða loysnir

Tosið við:
Eyðfinn Jacobsen, advokat ella
Kára á Rógvu, adv.fulltrúa um tygara tørv

Tróndargøta 19
P.O.Box 1218
FO-110 Tórshavn
tel 359900 - fax 359901
mobil 219902 - 222857
faroe-law@faroe-law.fo
http://www.faroe-law.fo

Lesið Sosialurin Sosialurin Sosialurin -tað loysir seg



FRÓÐSKAPARSETUR FØROYA

## Grundskeið í lóg

Fróðskaparsetur Føroya skipar í heyst fyri undirvísing í grundskeiði í lóg. Grundskeiðið er 15 ECTS, ið svarar til 1/4 ársverk. Skeiðið fevnir um ein almennan part, ið verður settur saman av pørtum sum: *at finna lóg, at skipa lóg, at smíða lóg, at tulka lóg* og einum serligum parti settur saman av *brotum úr galdandi stjórnar- og fyrisitingarlógum, serliga stýrisskipanarlógini, heimastýrisskipanini, ríkisgrundlógini, fyrisitingarlógini og innlitarlógini.*

Skeiðið er ætlað lesandi á setrinum, fólki við aðrari hægri útbúgving enn í løgfrøði, fólkið við fyrisitingarligum royndum, ið hava tørv á eftirútbúgving, men onnur kunna eisini, um pláss verður, innskriva seg. Fyritreytin er tá ein miðnámsútbúgving ella samsvarandi. Bert ein flokkur verður.

Undirvísingin verður tvær ferðir, teir tímar um vikuna týskvøld og hóskvøld kl. 16-18 í Ovastovu í Nóatúni. Undirvísingin byrjar 2. september og verður til 27. november.

Lærarar verða løgfrøðingurin Kári á Rógvi, Jonhard Klettheyggj og Jógvan Elias Winther Poulsen.

Umsóknarbløð fáast á:

**Fróðskaparsetur Føroya**
Søgu- & Samfelagsdeildini
J.C. Svabosgøta 7
100 Tórshavn
Tlf. 352580

**Umsóknarfreistin er sett til 24. august 2003.**



Broytingar

## Broyting í ferðaætlanini hjá Barsskor




Vegna havnagerð á Syðradali, siglir Barsskor eftir broyttari ferðaætlan á Húsar. Siglt verður soleiðis

| Dagur | Av Klaksvík | Av Húsum |
|---|---|---|
| X | 06:30 | 07:00 |
| 6 | 08:45 | 09:10 |
| 13 | 10:30 | 11:00 |
| 245 | 13:15 | 13:40 |
| 67 | 16:30 | 17:00 |
| X | 17:45 | 18:10 |
| 57 | 19:15 | 19:40 |

REPROZ

### Broytingar á leið 506

Túrurin av Trøllanesi gerandisdagar **kl 06:45** er fluttur til **kl 06:30**

Til Syðradals verður einans koyrt eftir tilkalling.
Bussur steðgar við Knúksdal.
Boðast skal frá ein tíma áðrenn á **telefon 21 58 68**

STRANDFARASKIP LANDSINS

www.ssl.fo · 34 30 30



Gravsteinar, kantsteinar og blómubeð

Nú eisini úr Føroyskum gróti

Skjót levering

Prísir við litmyndum verða sendir kring landið og til útlandið



Danstein
Tel. 447512
Tel. 217512
Tel. 318323
Fax 449961
www.danstein.fo
RUNAVÍK · R. C. EFFERSØESGØTA 19, TÓRSHAVN

Sosialurin · 311820



alfatransport

Vit átaka okkum allan vøruflutning

Ring og fá eitt gott tilboð

tel 50 51 91 • t-post: alfa@kallnet.fo



TIL SØLU



MITSUBISHI PAJERO
2800 TURBO intercooler

Árgangur: 2001/08
Km: 27.000
HK: 125

Aircondition
Fjarstýrt centrallás
CD spælara
El- spegl/rútar
Krók
Gáttir, alu-felgur, gittara o.a.
v/MVG

Tel. 211 211

Sosialurin 341800






Klædnahandilin Hjá Giggi til sølu við innbúgvi.

Møguleiki er at halda áfram í leigaðu hølunum.

**Sp/f Grannsko an Jóannis Skorheim**
Postsmoga 139 · Klaksvíksvegur 28
FO-700 Klaksvík · Tlf. 478 000

Sosialurin 341800